gult10 cyan10 magenta10 svart10



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

18 bátar seldu góð 14 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum fríggjadagin. Niðanfyri verður sølan hjá einstøku bátunum víst, eins og býtið av samlaðu veiðuni framgongur

| Syslu- nummar | Skipanavn | reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 102 | Bylgjan | lína | 1.460 |
| FD 361 | Súlan | lína | 960 |
| FD 571 | Durita | lína | 861 |
| FD1140 | Eyðin | lína | 841 |
| KG 129 | Brattaberg | lína | 390 |
| KG 21 | Kyrrasund | lína | 36 |
| KG 241 | Fremad | lína | 505 |
| KG 284 | Hellisendi | lína | 1.013 |
| KG 334 | Norðan | lína | 1.619 |
| KG 407 | Jøkul | lína | 2.170 |
| KG 608 | Herdis | lína | 290 |
| KG 640 | Hansa | lína | 25 |
| KG 642 | Bragd | lína | 1.713 |
| KG 666 | Sjóvarfossur | lína | 102 |
| KG 706 | Skýlisklettur | lína | 518 |
| KG 740 | Hópur | lína | 555 |
| KG 743 | Elsa | lína | 649 |
| KG 832 | Borgin | lína | 642 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 3&4 | 41 |
| Hýsa 1 | 3.017 |
| Hýsa 2 | 2.939 |
| Hýsa 3 | 2.290 |
| Hýsa 4 | 1.165 |
| Havtaska 0 | 42 |
| Hvítingur 0 | 2.727 |
| Kalvi 2 | 15 |
| Kalvi 3 | 7 |
| Longa 2 | 6 |
| Longa 4&5 | 13 |
| Skøta | 6 |
| Toskur 1 | 76 |
| Toskur 2 | 279 |
| Toskur 3 | 854 |
| Toskur 4 | 478 |
| Toskur 5 | 380 |
| Upsi 4 | 1 |
| Upsi 5 | 13 |

# Yvirlýsing

Føroya Arbeiðarafelag lýsir við hesum sín fulla stuðul til Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelag í stríði teirra móti Fíggjarmálastýrinum í sambandi við strandfaraskipið Teistan.

Vit fegnast um, at fútarætturin hevur víst frá sær áheitanini frá Fíggjarmálastýrinum um at seta nevndu feløgum bann fyri at nokta limum sínum at sigla við skipið, har ongar sáttmálaásetingar eru um hýruna.

Samstundis skulu vit harðliga átala framferðina hjá Fíggjarmálastýrinum og Strandfaraskipum Landsins, har hesir almennu stovnar royna at brúka fútarættin fyri at føra inn á føroyska arbeiðsmarknaðin skipanir, sum hvørki fakfeløgini ella politiski myndugleikin í Løgtinginum tekur undir við.

Framferðin hjá Fíggjarmálastýrinum og Strandfaraskipum Landsins kunnu ikki skiljast sum annað enn eitt álop á føroysku fakfelagsrørsluna og demokratisku skipan okkara sum heild.

**Føroya Arbeiðarafelag**
**Tórshavn,**
**hin 15. juni 2001**

VIÐMERKINGAR

# Ein viðmerking til Kristinu Háfoss



**Jóannes Eidesgaard**

Tað er ikki á hvørjum degi, at ein saklig og undirbygd grein er at lesa í bløðunum, sum viðger spurningin um loysing ella framhaldandi ríkisfelagsskap. Tað, sum vit dag og dagliga síggja, eru greinar, sum flóta yvir av hatri, bakbitum og persónligum álopum, sum als ikki eiga svar uppiborið.

Kristina Háfoss er eitt undantak. Hon hevði í síðstu viku eina grein við heitinum »Enn eitt rokniark«. Hon er búskaparfrøðing, men samstundis dylur hon ikki, at hon er fullveldisfólk. Tað var tí við spenningi, ein settist at lesa. Eg haldi greinina vera so mikið áhugaverda, at eg loyvi mær at gera nakrar viðmerkingar, hóast eg fakliga havi mínar stóru avmarkingar, í mun til hana. Mínar viðmerkingar eru tí meira leikmanskendar.

Hvat er eitt rokniark? Tað er og verður ikki annað enn eitt hent amboð. Tað, sum harafturímóti er avgerandi, er, hvørjar fyritreytir verða lagdar til grund fyri rokniarkið. Og her eri eg samdur við Kristinu Háfoss. Men tá rokniarkið bert er eitt amboð, so kann man heldur ikki forkasta eina framskriving ella eina meting, bert tí at hon er gjørd á einum rokniarki. Karsten Hansen, landsstýrismaður niðurgjørdi í útvarpinum metingina hjá einum búskaparfrøðingi, júst tí hon var á einum rokniarki. Tað er at fara efir manninum heldur enn bóltinum. Tað er ikki øðrvísi enn, tá skiparin gevur tólunum á brúnni skyldina fyri, at skipið rendi á land. Tólini eru bert amboð, og skiparin skapar fyriteytirnar.

Tí vildi eg fegin sæð frá einum búskaparfrøðingi sum eitt nú Kristinu Háfoss, hvørjar viðmerkingar hon hevur til tær fyriteytir, sum Javnaðarflokkurin hevur brúkt. Hvat heldur hon um ein árligan 2% vøkstur í inntøkunum? Er tað ov optimistiskt, ov pessimistiskt ella kanska realistiskt? Hvat sigur hon til ein árligan 1,5% vøkstur í útreiðslunum? Ella hvat sigur hon til 0,8% vøsktur, so sum landsstýrið brúkar í sínum rokniarki? Er tað so, at vit eru púra á skeivari leið, lat okkum so fáa tað at vita út frá fakligum grundum.

Høgni Hoydal segði í sínum viðmerkingum til okkara framskrivingar, at vit vildu bara fyri einhvønn prís fasthalda ríkisstuðulin. Tað var tað, sum tað heila snúði seg um. Ja, so samantvinnaði hann okkum við 80´árini, men lat tað fara. Men hetta kunnu vit ikki brúka til nakað sum helst, heldur ikki sum grundarlag fyri framhaldandi kjaki um, hvat fer at henda við okkara búskapi, nú blokkurin verður burtur eftir bert fýra árum.

Sjálvandi hevur Kristina Háfoss rætt í tí, at eitt rokniark kann misbrúkast. Men eg vil fegin undirstrika, at tað hevur tað so ikki verið talan um í okkara føri. Vit hava lagt nógv arbeiði í tað, eisini tí vit hildu, at einsamalla rokniarkið hjá landsstýrinum stóð sum einasti boðberi um búskaparligu lagnu okkara og hevði brúk fyri einum mótspæli. Men ásannandi, at hetta sjálvsagt byggir á metingar og fyritreytir, so lat okkum kjakast um hesar.

Síðan sigur hon nakað um, sum kundi borið á tað borðið, at hon gevur ríkisstuðulinum skyldina fyri tí, sum hendi í 80 árunum. Her eri eg langt frá samdur. At vit høvdu eitt vinnulív, sum bygdi sína tilveru á studning, tað var eitt val, sum politikkarar høvdu tikið. Eg haldi ikki, at eg fari so øgiliga skeivur, tá eg sigi, at tað var í 1975, meðan Tjóðveldisflokkurin umsat fiskivinnumál, at lunnarnir vórðu lagdir undir ta skipanina. Gaman í, Javnaðarflokkurin var eisini við.

Og vit fegnast eisini yvir, at tað gongur væl hjá føroyskari vinnu. Tó eiga vit í hesum sambandi at minnast til, at tá vit lovprísa vinnuni í dag, at alt gongur so væl, so varð hon also sanerað fyri hundraðtals milliónir við skattgjaldarans pengum. Man ikki lági kapitalkostnaðurin vera ein týðandi orsøk?

Kristina Háfoss tosar nógv um tillagingar av føroyska samfelagnum. Eg taki undir við henni í hesum, hetta er alla tíðina neyðugt. Men hvat er tað, sum forðar okkum í dag at gera hesar tillagingar? Og tá hon tosar um hesar tillagingar sum nakað nýtt, sum koma skal, hvat leggur hon so í hesar tillagingar? Hvat fer tað at merkja fyri vælferðastøðið í mun til í dag?

Men annars takk fyri eina áhugaverda grein, sum avgjørt er einum búskaparfrøðingi verdug, hóast tú ikki kom so nógv inn á búskaparligu fortreytirnar fyri okkara rokniarki. Og takk fyri, at tú sum ein av teimum fáu viðgongur, at fullveldið kemur at kosta.

# Íbúðarneyð í Havn



**Jacob Vestergaard**

Tað seinastu tíðina hava fjølmiðlarnir havt tíðindi um ymiska »neyð« í Havn, m.a. á barnaansingarøkinum og skúlaøkinum. Hesa vikuna hevur tað so verið »íbúðarneyðin« í Havn, sum hevur verið fremst á breddanum.

Trýstið á Havnina er so stórt, at ikki ber til at hýsa teimum fólkum, sum alsamt flyta til Havnar. Politikkarar í Havn og aðrastaðir eru á einum máli um, at okkurt má gerast. Tað almenna má koma uppí leikin so ella so, og Húsalánsgrunnurin er nevndur sum ein møguligur innsprænari av pengum.

Øll eru tey á einum máli um, at Havnin er miðdepilin, tann náttúrligi miðdepilin, har alt virksemi skal vera, bæði alment og privat. Havnin hevur jú eisini øll tey frítíðartilboð, sum fólk nú á døgum krevja.

Ongin mótmælir, tað tykist sum øll halda at so skal vera, Havnin skal hava meir og meir av almennu pengunum, sum allir føroyingar eiga at hava rætt til.

Alt hetta átti at fingið onkran at rakna við. Havnin bara veksur og veksur, meðan stórir partar av landinum standa í stað. Í staðin fyri at tosa um at venda gongdini við at leggja alment virksemi út um landið, verður argumenterað fyri at leggja meir av almennum pengum í Havn, í hesum førinum í íbúðarbygging.

Hóast føgur orð um økismenning og útjaðarapolitikk v.m., er ongin broyting. Meir og meir av landsfíggjarætlanini verður stýrt til Havnar og hevur økt alment og privat virksemi við sær.

Einasta loysnin á hesum »trupulleikum« er, at almennu pengarnir verða javnt býttir millum allar føroyingar á tann hátt, at almennu størvini verða flutt úr Havnini, út hagar, har onki virksemi er. Á hendan hátt verða »trupulleikarnir« í Havn loystir, samstundis sum skundað verður undir framburðin aðrastaðir.

Skal landinum verða lív lagað, skal meir til enn hvøss orð og politiskar yvirlýsingar. Avgerðin um at leggja umsitingina av Barsilsskipanini á Tvøroyri, sum hevur **eitt heilt starv**, ger ongan mun. Tað skal nógv sterkari lútur til, skal vend koma í.

Vónandi fær onkur eyguni upp, tí nú er um at vera ov seint.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# »Jóhanna« mundi forkomið fullveldisfundi



*Fólkafundurin var sera væl eydnaður.*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tað var um reppið, at vágssluppin "Johanna" mundi forkomið stóra fólkafundinum, íð varð lýstur av vera í Koltri sunnudagin. Hesin fundur var annars ein tungur burður, tí fyrst skuldi hann verða hildin í Dímun, men her var hann avlýstur av trygdarorsøkum. Og sunnumorgunin vildi so illa til, at "Jóhanna" tók í botn inni í havnini við Gomlurætt, og har stóð hon. Fjarðandi sjógvur var og hóast dugliga var roynt at fáa hana leysa aftur, so stóð sum í bergi. Endi var sett á ein buss og fólk hálaðu dúgliga í, men "Jóhanna" var treisk og vildi ikki uttan víðar flyta fólk út í Koltur. Hon gav seg ikki fyrr enn "Pressarin" hjá Tórshavnar Skipasmiðju skrykti hana leysa. Jóhanna fór síðan, eym um strákjølin, at flyta fólk út í Koltur.

Fólkafundurin varð hildin í elsta býlinginum í bygdini og hann var væleydnaður. Formaður Tjóðveldisflokksins helt fyrstu røðuna, síðan helt Óla Jákup í Dímum røðu, eftir honum Tórbjørn Jacobsen og Anita á Fríðriksmørk.

Tónleikabólkurin Clickhaze spældi áðrenn fundin og aftaná fundin og Koltur er tann fullkomni pallurin til fólkafundir í framtíðini.

Lesið annars reportasjuna í blaðnum í morgin.



*"Jóhanna" tók botn, tá hon skuldi flyta fólk á fólkafund í Koltri sunnudagin.*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard.*

# Metstórur Jazz-festivalur í ár

**Festivalurin í ár metstórur við 175 luttakarum**
**- 14 føroyskir og 14 útlendskir bólkar spæla**

Samanborin við allar undanfarnar jazzfestivalir, er Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur 2001, meira enn tvífalt so stórur. Útivið 200 tónleikarar fara at undirhalda og bergtaka á meira enn 50 konsertum. Og av teimum er umleið helvtin føroyskir luttakarar. M.o. Eivør Pálsdóttir. Av teimum útlendsku er Niels Henning Ørsted-Pedersen kendastur.

Fesivalurin í ár er eisini meira ein festivalur, enn tað vit hava upplivað hini árin. Nærum alt fór fram í Norðurlandahúsinum, meðan fáir tónar hoyrdust úr sjálvum býnum. Í ár er Norðurlandahúsið høvuðskarmur um eitt av kvøldunum, meðan tað annars verður spælt úr øllum herðashornum í Tórshavn.

Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur 2001 verður hildin í døgunum frá 3. til 8. juli.

Tá Norðurlandahúsið valdi Listastastevnuna til høvuðsfestival í ár, gjørdu teir sum fyrireika Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festival av at royna nakað heilt annað. Og kanska er tað soleiðis, at vit fyrst nú kunnu kallað Jazzfestivalin ein rættan festival. Tí ikki fyrr enn í ár verður býurin í stóran mun merktur av tí jazzi, bluesi, rokki, fólka- og gospeltónleiki, sum Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur altíð hevur á skránni.

Spælistøðini verða Gongugøtan, FK. Gongugøtan, Vaglið. Vesturkirkjan. Listaskálin. Norðurlandahúsið. Hotel Hafnia. Gamla Meiaríið. Sjónleikarhúsið. PLATFORM. Dómkirkjan. Og haraftrat verður spælt á Hotel Vágum, umborð á Norðlýsinum í samband við útferðir, og í Festival Klubbanum.

Lagt eigur at verða merkis, at ein rættiliga stórur partur av konsertunum eru ókeypis.

**Eitt sindur fyri tey flestu**

Skráin er løgd soleiðis til rættis, at tú kanst fara frá einum tiltaki til annað, uttan at verða fyri nøkrum stórvegis missi. Tú kanst t.d. byrja festivaldagin við einum túri í Gongugøtuni, Listaskálanum, í kirkju, ella til undirhald í samband við innkeyp hjá FK í Hoyvík. Síðani kanst tú fara í Gamla Meiaríið og Sjónleikarhúsið. Og enda kvøldið í PLATFORM og Festival Klubbanum. Eisini ber til at fara á Hotel Hafnia til ein góða bita og festivalundirhald. Mikukvøldið verða tey stóru tiltøkini í Norðurlandahúsinum. 3. og 8. juli er Concert Grotto konsert, sum Norðlýsið siglir teg til. Og 3. juli er áhugavert undirhald á Hotel Vágum.

Tónleikaliga fevnir Jazzfestivalurin víða. Nógvastaðni verða tónar spældir, sum øllum dáma at hoyra, s.s. stillan swing jazz, fólkatónleik, blokkfloytutónar, og bassspæl við heimsins besta jazzbassspælara. Onnur tiltøk innihalda rokk-, popp-og blues tónleik. Og aftur onnur eru fyri tey, sum dáma serlig tónleikasløg.

**Føroyski parturin fjøltáttaður**

Av teimum 28 samsansetingum eru 14 føroyskar. Og føroyingarnir fara neyvan at smæðast burtur.

Fyrst kunnu vit nevna eitt petti av "framtíðini". Faroe Teens (14 ár og yngri) er annar av bólkunum frá Pop Top konsertini, sum tekur lut á Jazzfestivalinum. Og sagt verður, at hann er sera framkomin. Brandur Enni syngur. Og sjálvdan er tað sætt, at ein so ungur maður kann skifta dur klokkureint mitt í einum sangi.

Tann 17 ára gamla Eivør Pálsdóttir stillar upp saman við restini av manningini í Clickhaze. Tey vunnu Prix Føroyar 2001.

Ung Stjørnuskot er annar spennandi ungdómsbólkur. Tey ungu telja 30 sangarar, umframt tónleikarar frá Musikkskúlanum, sum Bo Isholm hevur vant.

Annað ungdómskent eru Jassararnir, ið fyri seinastu ferð spæla við núverandi samanseting.

Men hyggja vit nærri, er nógv føroyskt við, sum borgar fyri rutineraðum spæli og sangi. Edvard Nyholm Debes og aðrar góðar kreftir spæla tónleik fra Debazz útgávuni.

Malan Thomsen Band spælir popp frá hennara sera vælumtóktu útgávu.

Á brassøkinium er eisini Tórshavnar Saxofon Kvartett; Hans Petur í Brekkunum, Mads Hoydal, Mortan Zachariassen, og Eirikur Skála. Talan er um alt frá løgum sum Alley Cat til meira modernaðan tónleik.

Gunnar Guttesen Band og blues-bólkin TEIR, spæla í gamla Meiaríið saman við eitt orkestur, sum er mannaður við konservatoriinæmingum úr Danmark.

Unn Patursson er eitt tað mest aktuella rokk/poppnavnið, ið saman við bólki sínum bjóðar tónleik fra sermerktu útgávuni Gloymska Við Grape.

Og fiól/klaver-duettin Grapelli Swing Jazz spælir i matstovuni á Hotel Hafnia. Nikolaus Kapnas og Stamen Stanchev fara at undirhalda teimum etandi festivalgestunum við løttum løgum sum Tea For Two o.ø.

**Útlandið eisini væl við**

Bassspælarin Niels Henning Ørsted-Pedersen er oddafiskur, tá vit nú umrøða útlendsku luttakararnar. Sjálvdan hevur heimurin sæð ein betri tónleikara. Og NHØP spælir mikukvøldið í Norðurlandahúsinum saman við klaverspælaranum Ole Kock Hansen. Teir spæla tónleik við rót í jazzi og norðurlendskum tónleiki.

Gospelbólkurin PRAISE hevur ein songkvinnu, sum oftani hevur sungið saman við Ettu Cameron. Sama fer eisini at traðka upp við Ungum Stjørnuskotum.

Pia Dahl og Bo Isholm spæla blokkfloytu og gittar. Bo Isholm er dani av føroyskari ætt, og hann býr í Havn. Pia Dahl hevur havt teir somu undirvísararnir sum Michala Petri, so tað átti at borga fyri dygd. Pia Dahl hevur eisini gjørt eina fløgu við blokkfloytutónleiki.

Frá musikkskúlanum Ledøje Smørum, DK, vitja tríggjar ymsar samansetingar. Bæði eitt Big Band, eitt hamoniorkestur, og PWCIM Rock‘n Soul Band.

Hans Ulrik Quintet, ella Hans Ulrik JAZZ-MAMBO, hevur leiðaran og saxofonistin Hans Ulrik, sum hevur fingið nógvar virðirlønir. T.d. í 1999 og 2000 fyri ársins útgávu.

Jens Nørholms Orange Jazz Family spælir standardjazz í nýtímans búnað.

Úr Íslandi vitjar KK. Kristján Kristjánsson hevur fyrr spælt í Føroyum. T.d. varð tilfarið til útgávuna Hotel Föroyar skrivað í Havn í samband við framførslu á Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivali.

Ein sera evnaríkur jazzbólkur kemur úr Finnlandi. Markku Rinta-Pollari er bæði navnið á bólkinum og leiðaranum. Hugsa vit um jazzdygdir burturav, hevur Finnland lagt nógv lond afturum seg. Tað kunnu vit uppliva á Gamla Meiaríi. Og í hellinum í Hesti.

**Hósdagin byrjar atgongumerkjasølan**

Til Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festivalur byrjar 3. juli, fer Sosialurin regluliga at skriva um ymsu tiltøkini. Fleiri nøvn eru ikki nevnd hesaferð, og øðrum mugu vit bara sleppa at greiða tykkum nærri frá.

Atgongumerkini verða frá hósdegnum, 21.06.01, seld i Kunnningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum í Føroyum.

Eisini er tað hósdagin, at skráin fyri Tórshavnar Jazz- Fólka- og Blues Festival 2001 verður prentað í bløðini.